

*-Eg haldi at handan seinasta bjargingin var nokk so týdningarmikil, men annars veit eg ikki*
**Mynd: Jonhard Hammer**

# Hugsaði ikki um nakað

*Einki er at taka seg aftur í, at tað meira enn nøkur onnur var Marita Hermansen, sum tryggjaði Kyndli fyrsta sigurin nakrantíð í steypakappingini hjá kvinnunm*

Jákup Mørk

Tað var ikki tað stóra, sum kom burtur úr samøðu okkara við Maritu Hermansen, tá vit stutt eftir steypasigurin fingu orðið á hana.

Umgyrd av familjuni fegnaðist hon um nývunna steypið, men tá vit spurdu hana, hvat hon helt um sín egna leiklut í øllum hesum var hon heldur fámælt.

-Eg haldi at handan seinasta bjargingin hevði stóran týdning, men annars veit eg slettis ikki, hvat eg skal siga, vóru orðini hjá málverjanum.

Víðari segði hon tó, at hon satt at siga ikki hugsaði um nakað sum helst, tá hon tvær ferðir hevði sera týdningarmiklar bjargingar, tá Sólrun Krosslá var sloppin leys. Hvat støðan tá var, og hvussu nógv tíð var eftir hugsaði hon als ikki um, men royndi bara at verja málið.

Tá gjørdi hon so í øllum førum somikið væl, at steypið varð fingið til høldar, og verður hugsað um kappingina sum heild, er lítið at ivast í, at hon so sanniliga eisini átti sín leiklut í, at Kyndil yvirhøvur varð umboðað í finaludystinum.

Í teimum báðum hálvfinalunum móti Stjørnuni stóð hon nevnliga tveir framúr góðar dystir, og yvirhøvur hevur hon staðið seg avbera væl hetta kappingarárið.

Í fleiri dystum hevur hon verið høvuðsorsøkin til, at kyndilsliðið hevur fingið nakað burtur úr dystinum, og hetta hevur hon so eisini fingið løn fyri, við tað at Sophus Dahl Christiansen, sum er venjari hjá kvinnulandsliðinum, hevur tikið hana við í landsliðshópin.

### FM ikki slept

Kyndil hevur við steypasigrinum tryggjað sær luttøku í europeiskum høpi komandi ár, og hetta var eisini málið við kappingarársbyrjan.

Spurd um kappingarárið nú er bjargað, soleiðis at tær nú hava fingið tað tær ætlaðu, svaraði málverjin: Nei, FM stríðið er ikki slept enn, men tað verður helst eitt sindur torført at gera nakað við Stjørnuna, men vit ætla so at royna, so leingi møguleikin er til staðar.

Hon er tó bangin fyri, at Stjørnan hevur fingið ov langt tjóður í so máta, men alla ta tíð at nóg nógvir dystir eru eftir at leika, hevur kyndilsliðið sjálvsagt møguleikan at fanga tær aftur, og har við vinna greipuna, sum felagið ongantíð fyrr hevur havt hendur á.

# Fegnast um avrikið

*Fyrrverandi neistamálverjin, Hans Jákup Hermansen, sum er pápi at kyndilsmálverjanum, kundi eftir dystin fegnast saman við dóttrini*

Jákup Mørk

Hon hevur tað ikki eftir ongum, Marita Hermansen. Í eini 10 ár var pápin, Hans Jákup Hermansen, málverji á besta mansliðnum hjá Neistanum, og framvegis er hann aktivur, tá hann saman við fleiri øðrum veteranum tørnar út í triðbestu mansdeildini.

Eftir dystin hittu vit stolta pápan, og spurdu hann, hvønn týdning hann helt avrikið hjá Maritu hevði fyri dystin.

Hans Jákup var samdur í, at tær bjargingar, sum Marita hevði móti endanum av dystinum, høvdu alstóran týdning fyri endaliga úrslitið.

Hann helt tó eisini, at dótturin hevur staðið seg sera væl so at siga alt kappingarárið, og tað man ikki vera nakað dulsmál, at hon í fleiri dystum hevur verið munurin á Kyndli og mótstøðuliðnum.



*Marita, umgyrd av foreldrunum, Hans Jákupi og Sigrun og systkunum báðum, Herman og Bodil*
**Mynd: Jonhard Hammer**

### Liðavrik

Hans Jákup legði tó afturat, at Marita so at siga bert gjørdi sín part av avrikinum. Talan var jú eisini um eitt rættuligt liðavrik, har allar lyftu í felag.

Í sama viðfangi heldur hann eisini, at VB so sanniliga eisini hevur uppiborið rós fyri teirra leiklut í dystinum. -Tær vildu alla tíðina vera við til at skapa dystin, og tað var eisini viðvirkandi til, at vit ein so spennandi og undirhaldandi dyst, segði fyrrverandi neistamálverjin, sum eisini helt tað vera stuttligt, at tað nú vóru somikið nógvir áskoðarar til avgerandi dystirnar í hondbóltskappingini, við tað at hetta setur rættuligan dám á dystirnar.

At enda spurdu vit hann, um tað hevði nakað at siga fyri honum, at dótturin varði málið hjá Kyndli, og ikki hjá Neistanum, har hon tó eisini hevur roynt seg.

- Eg eri bæði glaður og stoltur um at eiga eina dóttur, sum í dag kann kalla seg steypavinnara, og so er tað líka mikið, hvørjum liðið tað er við. Nú ætli eg mær tó at rópa á Neistan, vóru seinastu orðini vit fingu frá Hans Jákupi, áðrenn hann fór yvir at finna sær sess, áðrenn menninir fóru í holt við sín finaludyst.

# Hava sjálvir skuldina

*Heini Joensen heldur ikki nakra orsøk vera til at koma við umberingum eftir tapið leygardagin. -Hatta høvdu vit sjálvir skuldina fyri, helt liðformaðurin eftir dystin*

Jákup Mørk

Tað var ein vónbrotin Heini Joensen, sum eftir dystin stóð við blómutyssunum og hugsaði um dystin, sum júst var liðugt leiktur.

Hann helt tað snøgt sagt vera ov vánaligt, at lið hansara ikki megnaði at halda fast um leiðsluna, sum tíðliga í seinna hálvleiki var ikki minni enn 18-12.

-Tá Áki og eg verða mansvardir, merkir tað samstundis, at hinir leikararnir hava umleiði fýra metrar hvør at spæla á, og hetta eigur at opna fyri møguleikum. Ikki tí, eg hevði eisini møguleika at avgera dystin sjálvur, men eins og liðfelagarnir, so brendi eg, tá eg slapp leysur.



*Hóast stóra vónbrotið, so hevði Heini tó yvirskot til at handa mótstøðumonnunum eitt blómutyssi eftir dystin*
**Mynd: Jonhard Hammer**

Spurdur um teir ikki høvdu gjørt nakað við mansverjuna undir venjing segði hann, at teir sum so ikki høvdu vant hesa støðu undir venjing.

Hetta má sigast at vera eitt sindur hugvekjandi, tí tað kann neyvan koma sum ein skelkur av teimum stóru, at mótstøðuliðið finnur upp á at mansverja teir báðar. Bæði Kyndil og StÍF hava fyrr í ár roynt hetta, og uttan iva fara onnur lið eisini at royna tað sama, so tað er í hvussu er nakað, sum Páll Poulsen átti at umhugsað.

### FM er eftir

Eftir at hava tosað um farna dystin, numu vit samstundis við spurningin um FM-stríðið, har Neistin framvegis hevur ein stóran leiklut.

Heini helt tó sjálvur, at hetta orkaði hann als ikki at hugsa um nú. Hann legði tó afturat, at teir sjálvandi fara eftir FM-heitinum, men í løtuni var hetta ikki tað, sum hevði fremsta pláss í hugaheiminum.





*Janus Einar fær her boðini frá Palla Joensen um, at hann er úttikin til landsliðshópin*
**Mynd: Jonhard Hammer**

# Fekk landsliðsboð

*Eftir steypasigurin fekk strikuspælarin hjá Kyndli, Janus Einar Sørensen, enn meira at fegnast um, tá landsliðsvenjarin, Palli Joensen, kundi siga honum at hann var úttikin til landsliðshópin*

Jákup Mørk

Enn er hann einans 19 ár, men longu nú eru fleiri farin at rokna hann millum fremstu strikuspælararnar her á landi. Janus Einar Sørensen hevur rættuliga gjørt um seg á kyndilsliðnum hetta kappingarárið, og eftir steypafinaluna fekk hann eitt stórt herðaklapp fyri hetta, tá Palli Joensen boðaði honum frá, at hann nú var úttikin til A-landsliðið.

Palli sigur við Sosialin, at hann hevur hugsað um, at tikið enn ein strikuspælara inn í hópin, tí hetta er eitt av teimum plássum, har teir ikki tosa skaðar. Um ein bakkur ella vongur verður skaddur, ber altíð til at blanda kortini eitt sindur øðrvísi, men verður annar av strikuspælarunum skaddur, er bert ein leikari til allar 60 minuttirnar, og tí er neyðugt at hava tríggjar leikarar til hetta plássið.

### Ein dreymur

Sjálvur sigur Janus Einar, at hann sjálvsagt hevur vónað, at tað eina ferð vórðu boð eftir sær. - Sjálvandi er hetta ein dreymur, sum nú er gingin út, sigur greiðir hann frá. Seinasta ár var hann annars við U-18 landsliði okkara, og í ár var so ætlanin, at hann skuldi vera á U-21 liðnum, men hetta verður nu helst av ongum.

Leiðin inn á besta liðið hjá Kyndli hevur verið rættuliga stutt hjá Janusi Einari. Seinasta ár kom inn í flestu dystunum í endaspælinum, og í ár hevur tað meira ella minni eydnast honum at skumpa undangongumann sín, Rúna Poulsen, út á beinkin.

Janus Einar leggur tó áherslu á, at hann og Rúni hava tað fínt sínamillum. - At vit kappast er bara nátúrligt, og hetta er eisini við til at gera okkum til betri leikarar. Eisini heldur hann, at teir báðir eru rættuliga ymiskir í spælistíli, og tískil riggar tað øgiliga væl hjá teimum. Venjarin hevur altíð møguleika at skifta, um so er, at mótstøðuverjan hevur ov gott tak á, og hetta kom eitt nú til sjóndar, tá seinna hálvfinalan móti VÍF varð leikt.

Annars legði Janus Einar afturat, at fyri hansara viðkomandi hevði tað verið ótrúliga lætt at fella inn í góða samanhaldið, sum er á liðnum.

- Hóast aldursmunurin millum ymsu leikararnar er rættuliga stórur, er hetta als ikki nakað sum merkist í hópinum. Kanska hava vit arga Hannis eitt sindur, nú hann hevur verið skaddur so leingi, men samanumtikið fungerar liðið ótrúliga væl uttan fyri vøllin, sigur strikuspælarin og nýklækti landsliðsleikarin at enda.

# Lyftu í felag

*Miðlingurin av hondbóltsbrøðrunum, Uni Wardum, helt, at liðavrikið var størsta ørsøkin til, at Kyndil leygardagin varð steypavinnari hjá monnunum*

Jákup Mørk

Liðskiparin hjá Kyndli, Uni Wardum, kundi leygardagin fegnast um higartil triðja steypasigurin, og fyri fyrstu ferð kundi hann fegnast um hetta saman við brøðrunum, Hannis og Bjarna.

Hann var sannførdur um, at talan í stóran mun var um eitt megnar liðavrik, sum at enda viðførdi, at kyndilsliðið megnaði at koppa Neistanum.

### Skeldaðust í hálvleikinum

Eftir mínum tykki tóktust kyndilsmenninir eitt sindur mótfalnir, tá farið varð inn til seinna hálvleik.



*Ein stór hondbóltsfamilja: f.v. Jóannes, Bjarni, Rúna, Beinta, Uni, Tróndur, Bartal, Hannis, Katrin og Sólrun*
**Mynd: Jonhard Hammer**

Spurdur um hetta svaraði liðformaðurin, at teir høvdu skeldast eitt sindur í hálvleikinum, men hetta var so viðvirkandi til, at vit allir fingu reinsað luftina.

Aftan á samdust vit so um, at nú skuldu vit út sum ein eind, og í felag gera eina roynd at venda dystinum.

At hetta eydnaðist komst í stóran mun av, at vit við hjálp av mansverjuni fingu fatur á bæði Heina og Áka. 3-2-1 verjan, sum vit royndu í fyrra hálvleiki gav ikki ætlaða úrslitið, men framman undan vóru vit fyrireikaðir upp á, at hetta kundi henda, og tískil kendu vit eisini uppgávuna, tá vit í seinna hálvleiki fóru at mansverja.

Eisini helt hann, at eldri bróðurin, Hannis, átti sín leiklut í sigrinum. Talan er sjálvandi fyrst og fremst um eitt liðavrik, men Hannis hevur nakrar ótrúliga týdningarmiklar skoringar, sum eisini eru viðvirkandi til, at vit sjálvir vinda okkum meira og meira upp.



*Í fyrra hálvleiki var lagið ikki altíð líka gott…*
**Mynd: Jonhard Hammer**

# Stemningurin var ótrúligur

*Eins og hjá kvinnunum, átti málverjin sín stóra leiklut í, at kyndilsmenninir komandi árið kunnu kalla seg steypavinnarar*

Jákup Mørk

Ein av orsøkunum til at tað eydnaðist Kyndli at taka Neistan aftur, var at Lars Winther stóð seg sea væl í seinna hálvleiki.

Efti dystin hittu vit Lars, og spurdu hann, hvussu tað bar til, at hann menti seg somikið nógv í seinna hálvleiki.

Sjálvur heldur hann, at høvuðsorsøkin til, at hann byrjaði at fanga skotini var, at Heini og Áki vórðu mansvardir. - Hetta tók líka sum broddin av teirra skotstyrki, og beint eftir hetta hevði eg tvær bjargingar sjálvir, og so koyrir tað bara, sigur Lars, sum annars eisini legði stóran dent á, at stemningurin, sum var í høllini, eisini gjørdi sítt til, at kyndilsliðið megnaði stóra takið.

### Liðavrik

Lars hevði tó ongan hug til at taka allan heiðurin einsamallur, men legði í staðin dent á, at talan var um eitt rættuligt liðavrik, har hvør tann einasti leikari gjørdi sítt til at venda dystargongdini.

- Eisini hevði tað stóran týdning, at Petur ikki stóð seg eins væl í seinna hálvleiki, sumí fyrra, og hóast Bogi stóð seg væl, tá hann kom inn, so var tað ikki nóg mikið til at bremsa okkum.



*…Men eftir dystin vórðu allar hugsandi orsøkir til at lata champagnupropparnar flúgva*
**Mynd: Jonhard Hammer**